**Býráðsfundur mánadagin 28. februar 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**Fundarskrá:**

**1. 11/00118**
**Skúlaspírin**
Støðutakan til framtíðar Skúlaspíran.

Tá samtykt varð at seta skúlaspíran á stovn síðsta summar, bleiv eisini samtykt at talan skuldi verða um eitt eitt royndarár.

**Fundarsamtykt:**

Borgarstjórin setti fram soljóðandi uppskot:
*"Skúlaspírin heldur fram fyribils í 1 ár afturat, og neyðugu tillaðingar, sum vístar verða á í nøgdsemiskanningini verða gjørdar."*

Páll Isholm sett fram soljóðandi uppskot:
*"Málið verður beint í trivnaðarnevndina og fíggjarnevndina til viðgerðar, áðrenn endalig støða verður tikin."*

Fyrst varð atkvøtt um uppskotið hjá Páll Isholm og atkvøtt varð soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Tollakur Joensen
Páll Isholm

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen
Joen Magnus Rasmussen
Terji Lervig
Jan E. Petersen
Hanna Jensen
Hans Mourits Foldbo

**Atkvøddi blankt:**
Fríðgerð Heinesen

Síðani varð atkvøtt um uppskotið hjá borgarstjóranum:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Joen Magnus Rasmussen
Terji Lervig
Jan E. Petersen
Hanna Jensen
Fríðgerð Heinesen
Hans Mourits Foldbo

**Býráðsfundur mánadagin 28. februar 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**Atkvøður ímóti:**
Páll Isholm, við tí viðmerking at ov nógv ógreið formilig viðurskifti eru, og at líknandi tilboð væl kann skipast innan verandi kommunalar stovnar.

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

Sostatt er uppskotið hjá borgarstjóranum samtykt.

**2. 11/00035**
**Leiðsluviðurskiftini í Skúlaspíranum**
Núverandi leiðsla er tvídeild (Skúlastjórin og leiðarin á frítíðarheiminum í Skúlaspíranum). Bæði Lærarafelagið og Føroya Pedagogfelag góðtóku hendan leiðsluform í eitt ár t.v.s skúlaárið 2010/2011. Øll starvsfólkini í skúlaspíranum eru fyribils sett til 1. Juli 2011.

Núverandi leiðsla hevur boðað frá, at tey ynskja at fáa eina útmelding frá kommununi um hvussu verður við leiðslu og starvsfólkum eftir summarfrítíðina. Soleiðis at tey kunnu boða starvfólkunum frá hesum.

Málið var fyri á býráðsfundinum tann 27.januar 2011, og tá mælti fíggjarnevndin til at, at leiðslan avforskúlanum í kommununi er knýtt at staðsetingini av forskúlanum. Í Eysturkommuna er forskúlin inni í fólkaskúlanum, og tískil verður skúlaleiðarin leiðari av forskúlanum í Eysturkommunu.

Páll Isholm setti fram broytingaruppskotum at málið verður útsett til eftirmetingin av Skúlaspíranum er liðug, og varð tað einmælt samtykt.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Joen Magnus Rasmussen
Terji Lervig
Jan E. Petersen
Hanna Jensen
Fríðgerð Heinesen
Hans Mourits Foldbo

**Atkvøður ímóti:**
Páll Isholm við tí viðmerking at øll við leiðsluábyrgd í kommununi skulu setast í starv og loysast úr starvi av kommununi.

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

**Býráðsfundur mánadagin 28. februar 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**3. 11/00036**
**Útbygging av Leirvíkar skúla**

Á býráðsfundinum tann 27. januar bleiv samtykt at arbeiða víðari við málinum út frá fyriliggjandi tekningum.

Nú er komið so langt áleiðis við projekteringini, at útbjóðingartilfar til útgrevstur og planering kann gerast og bjóðast út.

Uppskot til til útbygging og uttanumsøkið fyriliggur.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku umsiting. Arbeiðið verður boðið út í samráð við teknisku nevnd.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Joen Magnus Rasmussen
Terji Lervig
Jan E. Petersen
Hanna Jensen
Fríðgerð Heinesen
Hans Mourits Foldbo
Páll Isholm

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

**4. 10/00530**
**Bátahylur á Toftanesi**

Bygginevndin er komin við hesum tilmæli:

*Bátahylurin verður útboðin og bygdur sambært uppskoti frá Selmar Nielsen, arkitektum, og LBF, verkfrøðingum (smb. dagførdum tekningum frá februar 2011).*

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini.

**5. 11/00055**
**Dagstovnurin Gjái, vindeygu**

**11/00045**
**Dagstovnurin Gjái, málaraarbeiði**

**11/00062**
**Dagstovnurin Gjái, broyting av vesirúmi**

Tekniska nevnd hevur samtykt at innheinta tilboð upp á íseting av vindeygum og at broyta vesirúmið, og mæla til at til at avgreiða málið á býráðsfundinum.

Fíggjarnevndin útsetti málið til býráðsfundin.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum, men eingin eygajáttan verður givin.

**Býráðsfundur mánadagin 28. februar 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

Tilmæli/raðfesting frá arbeiðsbólkinum viðv. Gjáa, fyriliggur.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

**6. 11/00105**

**Marknaumskipan millum matr. nr. 147av og litra g/347b í Leirvík**

Í sambandi við gjøngum gongd av matr. nr. 347ak í Leirvik kom fram, at marknaðarumskipanin millum matr. nr. 147av hjá Óla Olsen og litra g hjá Eysturkommunu (fyrr Leirvíkar kommunu) ikki er endaliga avgreitt.

Tekniska umsiting hevur kannað málið og staðfest, at matrikullinja hjá Óla Olsen liggur umleið 1,0 metur inni á kommunalum øki (inni á almennum vegi) og ein geiri upp á umleið 2,0 metur millun Óla Olsen og Janus Ryggshamar stendur í navni kommununar, men eftir hvat er upplýst skal hetta verða í býtið við tann partin hjá Óla ið liggur inn á kommunalan veg.

Tekniska nevnd mælir til at marknaumskipanin verður framd.

Einmælt samtykt taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

**7. 11/00071**

**Marknaumskipan matr. nr. 66b í Norðragøtu**

Malan Áslaksdóttir hevur sent umsókn um marknaumskipan millum 66b og 84b í Norðragøtu.

Tekniska nevnd mælir til at geva loyvi til marknaumskipan

Einmælt samtykt taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

**8. 11/00042**

**Fyrispurningur um uppdyrkingarveg/gonguveg í Norðragøtudali**

Málið verður lagt fram til støðutakan um viðgerð av fyrispurninginum.

Tekniska nevnd mælir frá at arbeiða víðarin við málinum.

Málið tikið av skrá.

**Býráðsfundur mánadagin 28. februar 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**9. 11/00053**

**Umsókn, frá Norrønafelagnum, um stuðul til vinarbýarstevnu í Ullensaker, Noreg.**

Trivnaðarnevndin mælir til at veita ein stuðul á kr. 20.000,00, og at peningurin verður tikin av konto 5.24.13 – 30 *(Vinarbýarsamstarv),* og at trivnaðarnevndin orðar eitt uppskot til framtíðar vinarbýarsamstarv í Eysturkommunu at leggja fyri Eysturkommunubýráð til samtyktar.

Fíggjarnevndin mælir til at veita stuðul sum svarar til ferðakostnaðin fyri 7 fólk, og í mesta lagi 30.000,00 kr. peningurin verður tikin av konto 5.24.13.510 *(Vinarbýarsamstarv)*. Kommunalt samstarv liggur sambært kommunustýsisskipanini hjá fíggjarnevndini. Trivnaðarnevndin kann tak sær av tí partinum sum er innan trivnaðarøki.

Einmælt samtykt taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**10. 11/00038**

**Fundarskipan fyri Eysturkommunu býráð**

Á fíggjarnevndarfundi tann 24. januar 2011 varð mælt til at leggja málið fyri býráðið.

Býráðið samtykti einmælt, tann 27. januar 2011, at beina málið í føstu nevndinar til víðari viðgerð.

Allar tær føstu nevndinar hava síðani viðgjørt fyriliggjandi uppskot, og allar mæla til at taka undir við tí.

Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fundarskipan fyri Eysturkommunu býráð.

**11. 11/00065**

**Umsókn um keyp av jørð á matr. nr. 128m í Leirvík**

Umsókn frá Trygva Jóhanson um at keypa umleið 17 fermetrar av 128h ið er kommunalur vegur/ parkeringspláss millum Svalir.

Tekniska nevnd hevur samtykt at fylgja tilmælinum hjá teknisku umsitingini, sum mælir frá at ganga umsóknini á møti.

Fíggjarnevndin hevur samtykt at beina málið til býráðið til støðutakan.

Einmælt samtykt at taka undir við samtyktini hjá teknisku nevnd.

*Jóhan Christiansen og Fríðgerð Heinesen vóru úti undir viðgerðini, vegna ógegni.*

## Býráðsfundur mánadagin 28. februar 2010 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**12. 10/00549**

**Fíggjarætlan fyri Kongshavanar havn fyri 2011**
Uppskot til fíggjarætlan fyriliggur

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi fíggjarætlan.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**13. 11/00112**

**Leiga/selja undirlendið til neystini á havnalagnum**
Í sambandi við nýggju neystini inni á Toftanesi, má støða takast til um ánarnir av neystunum skulu leiga undirlendi frá kommununi, ella um teir skulu keypa tað frá kommununi

Fíggjarnevndin mælir til at, undirlendini verða leiga frá kommununi

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Fríðgerð Heinesen ______________________________

Terji Lervig ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Joen Magnus Rasmussen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Páll Isholm ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________